DAGSINS MEINING

Ein ómissandi rættur

Føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Hetta hava fleiri serfrøðingar staðfest á tí væl eydnaðu grundlóggarráðstevnuni. Somuleiðis hava serfrøðingarnir Chimene Keitner, doktari, Sigurður Líndal og Eirikur Tómasson, professarar, staðfest, at sjálvsavgerðarrætturin er ikki mistur, tí hann er brúktur einaferð.

Samráðingarnar hjá undanfarna landsstýri við donsku stjórnina slitnaðu, tí danska stjórnin vil ikki viðurkenna, at føroyingar eru tjóð - ein nation - við sjálvsavgerðarrætti, hóast allir føroyskir flokkar og serfrøðingar halda fast um, at føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

Hava summir føroyingar ivast, er eingin grund at ivast longur. Fremstu serfrøðingar á hesum øki - bæði í Evropa og í amerikanska samveldinum - geva føroyingum rætt.

Harafturat staðfestir Chimene Keitner heilt greitt, at ein tjóð kann ikki missa sjálvsavgerðarrættin, um ein tjóð hevur brúkt hann einaferð. Tað merkir, at sjálvt um Føroyar nú velja eina nýggja skipan í ríkisfelagsskapinum - t.d. eina samveldisskipan - so merkir tað ikki, at vit seinri ikki kunnu velja ein aðra skipan seinri.

Hetta var júst tað, sum fyrst Tjóðveldisflokkurin, og seinri Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin, førdi fram, at hava vit góðtikið eina aðra skipan enn fullveldi, so ber ikki til at venda aftur, og seinri krevja fullveldi. Hesa grundgevingina brúkti Anfinn Kalsberg eisini, tá hann avlýsti ta ætlaðu fólkaatkvøðuna.

Tá var grundgevingin hon, at høvdu føroyingar sagt nei til fullveldi á fólkaatkvøðuni, høvdu vit limað okkum inn í danska ríki. Vit høvdu tá avreitt sjálvsavgerðarrættin og høvdu mist hann í allar tíðir. Men hetta er ikki so, segði Chimene Keitner.

Hetta er tann konservativa uppfatanin og stavar frá tí tíðini, tá hjálondini loystu frá meginlondunum. Tá fingu hjálondini tvinnar kostir í at velja - loysing ella samband! Hetta er jú sama valið, føroyska samráðingarnevndin fekk at vita frá dønum í 1946.

Men soleiðis er ikki altjóða uppfatanin í dag, helt Chimene Keitner fyri, og hesa fatan eiga føroyingar at halda fast um í komandi samráðingum við danir um framtíðarstøðu Føroya. Tí kunnu vit sláa fast, at føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti, sum ikki er mistur, um hann er brúktur einaferð.

Vónandi kann ríkisumboðsmaðurin bera hesi boðini til danskar politiskar myndugleikar. So er eisini tað komið burtur úr grundlógarráðstevnuni.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Til Mentamálanevndina í Tórshavnar kommunu

Hví kunnu føroyingar, ið eru fyribils burturstaddir í útbúgvingarørindum uttanlands, ikki skriva seg upp á bíðilista til barnaansing í Føroyum?

Vegna MFS
Hallbera West, ráðslimur
Katrin D. Apol, forkvinna í MFS

Nógvir føroyingar fara á hvørjum ári úr Føroyum og burtur í onnur lond at nema sær útbúgving. Størsti parturin av hesum leitar sær til Danmarkar. Her skal leggjast afturat, at tað í flestu førum er neyðugt hjá teimum ungu at fara uttanlanda at nema sær útbúgving, tí at hesir møguleikar ikki eru til staðar í føroyska samfelagnum. Ynskið hjá landinum eigur sjálvsagt at vera at fáa alt tað útbúna fólkið heim aftur til Føroya, tí samfelagið hevur brúk fyri teimum! Sostatt kann tað metast vera ein íløga í føroyska samfelagið at fáa fólk at venda heim - ein íløga, sum ikki eigur at verða gloymd. At hetta eisini er ynskið hjá føroyska myndileikunum, sæst m.a. við at lesandi á hvørjum ári fáa tillutað pening til ein ferðaseðil til Føroya. Hetta fyri at varðveita sambandið við heimlandið. Nógvir, fyri ikki at siga flestu, føroyingar ynskja at venda aftur til Føroya eftir lokna útbúgving, men trupulleikar við m.a. væntandi barnaansing og trupla bústaðarstøðan gera, at nógv halda seg aftur. Tíverri hava vit ikki nøkur hagtøl, sum kunnu vátta hetta, men hetta er nakað sum MFS kennir fleiri dømi um frá fyrrv. limum. Her skal leggjast afturat, at MFS, sum einasti miðil hjá teimum lesandi uttanlanda, hevur bestu føling við, hvat rørir seg millum tey lesandi uttanlanda.

Her skal somuleiðis vísast á, at tað ber til hjá føroyingum undir útbúgving uttanlanda at skriva seg upp á bíðilista til grundstykki. Hví er tað so ikki gjørligt hjá fyribils útisetum at skriva børnini á bíðilista til barnaansing? Hvat varð so av hesi íløguni í útisetarnar?

Um fortreytirnar í Føroyum ikki eru í lagi, so er ikki gjørligt at náa málsetningínum um, at fáa føroyingar at venda heim aftur eftir loknan lestur. Samstundis sum hetta er ein áheitan um at gera umstøðurnar hjá útisetum betri í Føroyum, so er hetta eisini ein ávaring um at taka hendan trupulleika í álvara. Tað sigur seg sjálvt, at um umstøðurnar uttanlanda eru nógv betur, so er tað sera skjótt, at heimflytingin til Føroya verður útsett og í ringasta føri ongantíð verður veruleiki.

Sum bíðilistarnir eru í dag eitt nú í Havnini, eru útlitini ikki serliga góð fyri nýútbúna føroyingin. Tá hann ikki fær børnini ansaði, sleppur hann als ikki at gagnnýta nývunna tittulin, men má í staðin ganga heima. Tað kann tískil ganga rúm tíð, áðrenn viðkomandi sleppur út á arbeiðsmarknaðin - og hvat vinnur landið so? Tað tykist løgið, og í veruleikanum ikki sørt sjálvmótsigandi, at rætturin til uppskriving til ansingarpláss ikki er sjálvsagdur eins og við grundstykkjunum. Í øllum førum er tað ein sannroynd, at nógv setast aftur, og í staðin velja at taka av einum arbeiðstilboði í útlandinum, har børnini sleppa á ansingarstovn. Skjótt festa fólkini rætur, og kanska venda tey ongantíð heim aftur. Hvat fekst so burturúr íløguni í løgga heilan, sum fekk fría ferð heim á hvørjum ári í eini 5-6 ár?

Tað kann ikki vera rætt, at viðurskiftini hjá teimum lesandi uttanlanda skulu vera so nógv verri enn hjá teimum, sum eru búsitandi í Føroyum.

MFS heitir tí á kommunurnar í Føroyum um at broyta verandi reglugerð, soleiðis at barnafamiljur uttanlanda, sum eru fyribils burturstaddar í lestrarørindum, kunnu skriva seg uppá bíðilista til ansingarpláss eins og barnafamiljur í Føroyum.

MFS hevur sent hetta skriv til tær størstu bústaðarkommunurnar í Føroyum og til landstýrismannin í kommunumálum.

MFS vil gjarna vera við í arbeiðnum at fyrireika hesar broytingar. Tit eru tískil vælkomin til at venda tykkum til MFS í hesum sambandi.

Opið bræv til Klaksvíkar Býráð:

Áheitan á býráðið: Gevið foreldrum beinleiðis ávirkan á dagrøktarskipanina

Vegna Norðoya Sambandsfelag
John William Joensen, formaður

Nú tað er greitt at rokningin fyri eina betri dagansingarskipan verður send barnafamiljunum, heitir Norðoya Sambandsfelag á býráði um at taka foreldur við í viðgerina av framtíðar útbyggingum av dagstovnunum.

Tað kann ikki verða rætt at gjaldið til dagstovnaplássini hækkar í trá við útbyggingarnar av stovnunum uttan at tey sum skullu gjaldað verða tikin við í viðgerðina av málinum.

Tað eru bert mánaðar síðan seinast gjaldið varð hækka og nú gjaldið aftur er hækkað er greitt at gjøldini, sum gongdin er nú, fara at halda á við at hækkað.

Í løtuni rindar kommunan 70% av rakstrinum og foreldur/brúkarar 30%. Men nú kommunan útbyggir stovnarnar og ansetur fólk á stovnum og í býráðsumsitingini hækkar gjaldið samsvarandi.

Foreldur við í viðgerðina

Vit meta at umboð fyri foreldur, sum eiga børn í dagstovninum, eiga at verða tikin við í viðgerina av gjaldinum fyri ansingarplássini, og at kommunan steðgar øllum útbyggingum av ansingarskipanini til greiða er fingin á hvør skal gjalda fyri plássini og hvussu bítið millum kommunu og foreldur/brúkarar skal verða.

Tað er ikki nøktandi at brúkargjøld soleiðis pr. automatik verða løgd á barnafamiljur.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstaðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fríi. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Oratoriið »Elias« eftir Mendelssohn á fyrsta sinni í Føroyum um vikuskiftið

TÍÐINDASKRIV

Eitt av tónleikasøgunnar gitnastu verkum fyri kór, solistar og orkestur verður at hoyra nú um vikuskiftið. Tað er oratoriið Elias eftir tøska tónaskaldið Mendelssohn.

Um tónaskaldið og verkið skrivar dirigenturin Steen Lindholm soleiðis:

"Felix Mendelssohn Bartholdy livdi fra 1809 til 1847 og fekk soleiðis eins og so mong onnur tónaskøld eina stutta æviskeið. Kortini náddi hann at gerast heimskendur bæði sum komponistur og sum dirigentur hjá tí gitna Gewandhausorchester í Leipzig - eitt ljómlið sum enn í dag telist millum tey fremstu í heiminum.

Mótsett so mongum øðrum tónaskøldum vaks Mendelssohn upp í einum valaheimi. Pápin Abraham Mendelssohn var vekslari í Hamborg; men longu tá í lítum til protestantis-muna fyrr enn í búnum árum.

Nógvur tónleikur varð framfordur í barndómsheiminum, og sjálvur skrivaði Mendelssohn longu sum smádrongur sínar fyrstu kompositiónir og stjórnaði framførslum av teimum á slíkum familjukonsertum!



Felix Mendelssohn Bartholdy

15-ára gamal var hann við pápanum í París og vísti har konseravatoriistjórannum, komponistinum Cherubini, sínar kompositiónir. Eftir tað fekk hann loyvi at kjósa sær tónleikin sum sítt lívsstarv.

Felix Mendelssohn hevði fjølltáttaðar gávur: hann granskaði eisini mál og myndlist, ikki var tað sørt, at hann sjálvur teknaði, og samanumtikið var hann sum tátíðar tónleikari ein óvanliga breitt mentaður maður. Hansara tónleikaskapandi gávur vóru av mozartskum slag: nótarnir flutu lætt og ótarnaðir av hansara penni, og dygdargott handverk var aftan fyri øll hansara tónaverk, instrumentaltónleikin eins væl og kórverkini.

Longu á 17 ára aldri skrivaði Mendelssohn sítt fyrsta meistaraverk, tónleikin til sjónleikin "Ein Hásummarnáttardreymur" eftir Shakespeare. Tað var eisini Mendelssohn, sum 20 ára gamal dró Matteuspassiónina hjá Bach fram aftur úr gloymskuni og framførdi hana á konsert í Berlin í 1929, hundrað ár eftir at hon varð skrivað.

Eftir eina tíð sum býartónleikastjóri í Düsseldorf fekk Mendelssohn starvið sum leiðari av áðurnevnda Gewandhausorchester í Leipzig. Umframt í Týsklandi stjórnaði hann eisini orkestrum í Onglandi, Fraklandi og í Italia. Fólk vóru hugtikin av honum bæði sum komponisti og sum dirigenti, og hann hevði stóra ávirkan á eina rød av seinni tónaskøldum. M.a. fekk hann stóran týdning fyri danska tónaskaldið Niels W. Gade, sum fór til Leipzig og vann sær har Mendelssohn sum sín góða vin og besta lærimeistara.

Uppvøkstur Mendelssohns í jødiskum-protestantiskum umhvørvi gjørdi, at hann varð hugfangaður av kirkjutónleiki. Hann skrivaði hópin av motettum til kirkjuligar tekstir, nakrar sera vakrar kantatur fyri kór og orkestur og kom í hæddina við oratoriunum Paulus (1836) og Elias (1846), harav serlig tað seinna telist millum tónleikasøgunnar fremstu avrik innan orkestur- og kórtonleik. Tað talar fyri seg, at næst eftir Händels Messias er Mendelssohns Elias mest framførda tónaverkið í Onglandi, har Mendelssohn sjálvur stjórnaði frumframførsluni í Birmingham.

Verkið er skrivað til týska bíbliutekstin í gamla testamenti, mest úr 1. og 2. Kongabók og snør seg um gerningarnar hjá profetinum Eliasi. Mendelssohn lagaði sjálvur tekstin um til tað enskt til fyrstuframførsluna; men týski tekstur er upprunin, og hann verður nýttur, nú verkið á fyrsta sinni verður framført í Føroyum.

Elias er profeturin, sum í einari hungurstíð trinir fram í tí plágaða Ísrael og m.a. vekir upp einkjunnar son av deyða. Hann er stríðsmaðurin, sum sigrar á avgudinum Baal, hvørs bál verður púrgjørt av Harrans báli, og profetar Baals síðan handtiknir og slátraðir. Eftir tað fær Elias við Harrans hjálp vatn til vegar til tað tystandi landið. Ein drongur skimast eftir regni, og tá tað kemur, setir fólki í lovsong fyri Harranum (endakórið í fyrra parti).

Tó eru trongdirnar enn ikki av. Elias má framhaldandi stríðast móti vantrúgv. Hann ger álop á Ahab kong, sum svarar aftur við at øsa fólkið upp móti Eliasi, sum má flýggja út í oyðimørkina. Eitt kór av einglum leiðir hann til Horab fjallið, og troystin kemur fram í sálmakenda satsinum: Tann, sum lítir á Harran til seinastu stund, skal gerast sælur.

Oratoriið endar við enn einum lovsangi til Harrans."

Føroyska frumframførslan av oratoriinum Elias verður í Fuglafjarðar Kirkju leygardagin klokkan 17.00, og verkið verður at hoyra í Norðurlandahúsinum sunnudagin kl. 16.00.

Almennur kjakfundur

TÍÐINDASKRIV

Føroyskt Lógar Rit skipar fyri almennum kjakfundi í Útvarpshøllini hóskvøldið 13. mars kl. 19:30 við heitinum »Grundlóg og Føroyar«.

Pallborðsluttakararnir leggja fyri við upplegguum, og høvi verður eisini hjá áhoyrarunum at seta spurningar.

Við pallborðið sita: Bjørn á Heygum, advokatur, Halgir Winther Poulsen, advokatur, Súsanna Danielsen, skrivstovustjóri, og Zakarias Wang, stjórnmálafrøðingur.

Orðstýrari er Kári á Rógvi, og Dreingjakamarið syngur.

Møtið fjølment.

Við Bíbliuni í kríggj

Viggo Holm
Skála

Tá eg hugsi um, álopætlanirnar, sum Amerikumenn hava um Irak, kann tað so ikki verða aðrir møguleikar enn kríggj ?

So eru tað tingmenn, sum gera Amerikumenn til reinar einglar, m.a Jenis Av Rana. Fyri at skilja støðuna, søguna hjá Amerikanska kontinentinum, hvussu tey hvítu fólkini frá Kanada fyri norðan og Argentina fyri sunnan, hava fingið hendir á økið, ið tey búleikast í.

Tað var við skotvápn við høgru hond og bíbliuni við vinstru. Hetta má verða størsta ránsveiða í søgu mannaættarinnar. Men upprunafólkið hava ongatíð tikið nakað frá okkara heimsparti. USA og Stórabretland skulu halda uppat við bíta einarædisharrar sum fittir og ófittir t.d Pinochet frá Kili, hann fekk góða viðferð í Bretlandi, í staðinfyri at koyra hann í geglið. Í mínum hugaheimi eru allir einarædisharrar nøkur beist. Hvat er so munurin á kommunismu og kapitalismu? Kommunisma stavast við K, og kapitalisman stavast við K, hetta er tað einasta teirhava til felags. Í kommunist Kina var tað staturin ið stýrdi og hjá kapitalistunum var tað pengamenninir.

Undirritaði var í Hong Kong í fimmti árunum, og eisini í kommunist Kina, har var eingin munur á tí vanliga arbeiðsfólkinum, í hesum báðum londunum. Hetta haldi eg at vinir Bush og vinir Che Guevara og Castro skulu hugsa um.

Eg hoyrdi ein dagin hvussu óforur maður De Gaul fyrrverðandi forseti í fraklandi var, áðrenn hansara tíð skifti fransmenn stjórn fleiri ferðir um árið, enntá var hurlivasin so stórur tá, at undanmaður De Gauls bað De Gaaul um at skipa stjórn, hetta var í 1958. Síðani bað De Gaul Franska tingið, um eitt hálvt ár til, at gerða eina nýggja grundlóg. Eftir hetta hálva árið var grundlógin sett til fólkatkvøðu, og hon var góðtikin við stórum meiriluta. Árið eftir var hann valdur til landsins forseta, við tí nýggju grundlógini hevði forsetin fingið víðar heimildir, til at koyra tíðandi spurningar til fólkaatkvøðu. Tað fyrsta hann gjørdi var at seta til fólkaatkvøðu um, at sleppa av við koloniirnar í Afrika. Tað var viðtikið við fólkatkvøðu, at tey lond, ið ynsktu at sleppa úr samveldinum við Fraklandi, skuldu sleppa burturúr.

Hetta dámdu teimum fronsku generalunum í Algier einki, teir gjørdu uppreistur, og ætlaðu at leypa á Frakland sjálvt. De Gaul lýsti Frakland í krígsstøðu, tað mesta av Franska herinum vóru í Algier, men De Gaul fór í sjónvarpið og bað tað Franska fólkið at taka undir við De Gaul. Bussar og onnur akfør vóru koyrd út til flogvøllin, so generalarnir í Algier ikki skuldu enda har, tað eydnaðist eisini hjá De Gaul forða fyri álopi og harvið bjargaði hann Fraklandi. Síðani fór hann í holt við at rætta tann franska búskapin, tað gjørdi hann við at seta allar tíðandi spurningar út til fólkaatkvøðu. Ymiskt var frá tí eg sigldi, var 100 franc uml. 14 kr., síðani De Gaul var forseti bleiv 1 franc til 4 kr. í okkara peningi. Hann helt á við at seta tíðandi spurningar til fólkaatkvøðu, tí óskili í parlamentinum var ov stórt. So hendi tað í 1969, at hann sendi ein spurning til fólkaatkvøðu, har hann ikki fekk viðhald, dagin eftir fór hann úr forsetasessinum. Oftani er so við hernaðarleiðarum at koma teir fyrst framat, so fara teir ikki við góðum, tað var øørvísi við De Gaul, hann vildi ikki verða ein dag longri enn hann visti, at fólkið var við honum.

Tá beinleiðis fólkaatkvøður í Fraklandi og Sveits hava roynst væl, hví so ikki hjá okkum ?

Undirritaði heldur, at tað er tað lærda fólkið, ið ørkymlar fólkið, við óneyvum floyktum paragrafum.

Hvørki Føroyskir ella Danskir myndugleikar, virða tey grundlóg tryggjaðu rættindi hjá tí vanliga borgaranum.

Undirritaði skilur heldur ikki hví tað tekur so langa tí til at læra, sjálvur gekk hann niðan til grannakonuna, har hon lærdi seg at lesa og skriva undir kríggnum.

Undirritaði krevur ikki at tinglimir skulu duga hetta uttanat, men skilja hvat ein Sjálvstýrismaður av Skála skrivar.

Eg vil at enda heita á tingmenn, um ikki at óttast fyri at seta týðandi spurningar til fólkaatkvøðu.